# Lætt og skjótt at far

**- Tað er ótrúliga gott at sleppa undan at fara allan vegin til handils í Klaksvík at keypa tær vanligu vørurnar, - serliga hjá mær, sum plagi at gloyma helvtina av tí, eg ætlaði at keypa, sigur Maria Jacobsen á Viðareiði. Mikudagin í farnu viku var hon farin til handils í nýggja handlinum í heimbygdini, hvørs vørumerki er »Alt, .. lætt og skjótt!«**



TRIVNAÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Viðareiði:** - Ja, tað virkaði eitt sindur býtt, at ein mátti fara allan vegin til Klaksvíkar bara fyri at keypa ein pakka av mjólk, sigur Maria Jacobsen.

Í sløk tvey ár hevur eingin handil verið í bygdini, og hava tey, ið ikki dagliga vóru í Klaksvík, verið sera hørm um tað. Men nú er broytt.

Síðani í summar hava viðingar nevniliga havt møguleikan at fara til handils í heimbygdini. Og henda møguleikan hava nógv gjørt brúk av.

Ta stuttu løtuna, ið umboð fyri Sosialin vóru í handlinum, var væl av fólki á gátt, hóast bilur okkara, Snoddi stóð í túninum.

Enn er alt ikki liðugt uttanfyri. Men tað man fara at koma so við og við!

### Lá ikki eftir

Tað var ein sorgardagur fyri mong fólk á Viðareiði, tá bygdarhandilin lat aftur fyri fáum árum síðani.

Hesir handilseigararnir høvdu handilin í meiri enn 30 ár. Handilin kallaðist at byrja við "á Brekkumørk", men skifti seinni navn til "Brúgvaskiftið", eftir tí staðnum har handilin lá miðskeiðis í bygdini.

Á hesum staði høvdu fólk møguleika at keypa sær tær vanligu vørurnar til húsarhaldið, umframt tað at tey kundu fáa lut í somu tilboðum sum fólk aðrastaðni kring landið.

Men ein dagin í november 2006 var hesin møguleikin tikin frá teimum. Síðani hava tey verið noydd at farið annaðhvørt í kioskina í bygdini, ella til handlarnar í grannabygdunum – Norðdepli og Klaksvík, og kanska eisini í Árnafirði!

Um somu tíð var klaksvíkskvinnan Óluva Frederiksen farin at hugsa um, at hetta kundi ikki bera til í longdini. Hennara partur skuldi í øllum førum ikki liggja eftir, tá talan var um at tryggja bygdini sømiligt kor á hesum øki.

Hon og maðurin tosaðu saman um tað, fingu eitt øki til vega og leygardagin 19. juli í ár kundu viðingar aftur sleppa til handils í heimbygdini.

- Eg haldi, at tey vóru ógvuliga fegin um tað, sigur Óluva Frederiksen.

### Stuttur vegur

Maria Jacobsen er ein av mongum viðingum, sum við spenningi høvdu fylgt við, og helst eisini fregnast um, hvussu mundi gangast við byggingini av handilsbygninginum vestarlaga í bygdini.

Nú var Maria so »heppin«, at ta tíðina, ið eingin handil var á Viðareiði, búði hon í Havn. Hon er júst flutt norðuraftur, so tað hóskaði sera væl hjá henni í so máta.

Hon hevur verið javnan og keypt frá Óluvu, og var eisini til handils mikudagin í farnu viku, samstundis sum umboð fyri tíðindatænastuna fingu sær ein kaffimunn á staðnum.

Jú, Maria og øll hini tykjast sera fegin um nýggja handilin. Við sær í føvninginum eftir hesa vitjanina hevði hon mjólk og onnur ting, ið hoyra til eitt vanligt húsarhald.

- Fyrimunurin hjá mær er í øllum førum hann, at um eg havi gloymt at keypa okkurt, so kann eg bara fara aftur til handils beinanvegin.

- Tað er munur á at skula fara hetta lítla pettið í bygdini, enn at koyra allan vegin til Klaksvíkar, sigur Maria við einum brosi.

> *Tað er munur á at skula fara hetta lítla pettið í bygdini, enn at koyra allan vegin til Klaksvíkar*
>
> *Maria Jacobsen, viðskiftafólk, Viðareiði*

## Sami prísur hjá Óluvu

Einum nýtist ikki at hava verið leingi inni í handlinum, fyrrenn ein sær, at her er talan um ein nútíðar handil.

Hinvegin er Maria vitandi um, at skal hon gera okkurt serstakt til matna – kanska okkurt serligt slag av salati – so er ikki vist, at hon fær allar ingrediensirnar í heimbygdini.

Hennara royndir eru kortini tær, at ein fær nærum alt til keyps her í handlinum.

Ein spurningur, tá talan er um teir smærru bygdahandlarnar, er sjálvandi um teir eru kappingarførir í prísi við teir størru handlarnar og handilsketurnar í teimum stóru býunum.

Men Maria hevur sjálv ikki merkt so øgiliga nógv til tað, at handilin hjá Óluvu er dýrari enn aðrir.

- Eg haldi, at tað kostar nøkulunda tað sama her, sum tað kostar aðrastaðni. Okkurt er kanska dýrari, men tað hugsar man ikki um, tá ein hevur ein handil her í bygdini, slær Maria Jacobsen fast.

> *Eg haldi, at øll eru fegin um handilin, serliga tí at hann er opin so langt út á kvøldið*
>
> *Óluva Frederiksen, handilskvinna, Viðareiði*